## Hjálp til landbúnaðin

Børsen skrivar, at danska stjórnin fyrireikar ein hjálparpakka til landbúnaðin, og fyrrapartin vóru landbúnaðarframsøgufólkini hjá flokkunum á fundi við Lene Espersen, búskaparmálaráðharr og viðgjørdu ta fíggjarligu støðuna hjá landbúnaðinum. Tað er ikki greitt, hvussu stórur hjálparpakkin til landbúnaðin verður, men tað er eingin ivi um, at vinnan hevur hjálp fyri neyðini, skrivar DR. Víst verður á, at skuldin hjá landbúnaðinum er 350 milliardir krónur, og at framleiðslan gevur ov lítið.



## 207 tvingssilssølur

Fíggjarkreppan í Íslandi hevur millum annað gjørt, at nógvar fastar ognir eru endaðar á tvingsilssølu. Morgunblaðið skrivar, at í fjør vórðu 207 fastognir seldar á tvingsilssølu ímóti 161 árið fyri. Harafturat endaðu 441 bilar á tvingsilssølu í fjør, og tað var heldur færri enn í 2008. Tað vóru tó minni enn so allar ognir, sum fóru á tvang, hóast kravánarar høvdu biðið um tað. Í fjør vórðu ikki færri enn 2.504 fastar ognir kravdar á tvang og 1.068 bilar. Umframt fastar ognir og bilar viðgjørdu myndugleikarnir meiri enn 18.000 innheintingarkrøv, og tað var nakað tað sama sum í 2008.

## Bert 100 toll- og avgjaldsfríar sigarettir

**Frá 1. januar 2010 hava ferðandi bert loyvi til at flyta inn 100 sigarettir toll- og avgjaldsfrítt**



**TOLLUR**

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Hevur tú sum ferðandi fleiri sigarettir við enn tað, skal tú gjalda avgjald av teimum. Avgjaldið er 1,90 krónur fyri hvørja sigarett - ella 190 krónur fyri hina helvtina av kartonginum.

Avgjaldið skal gjaldast til tollarnar í reyðu rásini í komuhøllini á flogvøllinum ella um tú kemur við Norrønu í reyðu rásini á Farstøðini.

Taks minnir eisini á, at hava sigarettirnar hjá tær í tínum persónliga viðføri. Tað er ikki loyvt at hava við sær sigarettir fyri onnur.

Er tú tó somikið frekur, at tú hevur fleiri sigarettir enn loyvt er at flyta inn toll- og avgjaldsfrítt, og tú ikki boðar frá tí til tollarnar í reyðu rásini, men gongur víðari í grønu rásini 1 metur burturfrá, skal tú rokna við, umframt at skula gjalda avgjald, eisini at fáa álagt eina tollsekt. Tollsektin er vanliga 2 ferðir avgjaldið.

Sostatt kann tað koma at kosta heilt upp í 667 krónur fyri eitt kartong av sigarettum.

# Kunningarfundur um heimleys børn í Kenya

**Í annaðkvøld verður kunnandi fundur í Miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn um heimleys børn í Kenya**

Susanne og Leif Madsen hava arbeitt ímillum gøtubørn í Nakuru í Kenya í 15 ár. Í vikuni vitja tey, saman við afrikanska prestinum David Ford í Føroyum. Tey byrjaðu við at deila mat út til tey svongu gøtubørnini, og í dag leiða tey eitt eitt stórt hjálpararbeiði á staðnum. Seinastu fimm árini hava fleiri føroyingar arbeitt á staðnum í styttri og longri tíð.

Verkætlanin umfatar ídag:

- Barnaheim fyri 100 børnum
- Skúli við 550 næmingum
- 70 næmingar á hægri skúlum
- Seymiskúli við 35 næmingum
- Kreppumiðstøð fyri einligar kvinnur og mammur við børnum
- Dagsentur fyri kvinnur sum búgva við ruskdungan

Eisini fyriskipa tey ymisk hjálpartiltøk á staðnum, har neyðin er størst.

Mikukvøldið 13. Januar klokkan 20 verður høvi at hoyra tey greiða frá hesum arbeiði í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Tey fortelja um lívið ímillum gøtubørnini



Um lívssøgur hjá børnum á barnaheiminum

Myndir og filmur verður vístur

Høvið verður at seta teimum spurningar

Møguleiki verður at tekna seg sum faddur, ella við stuðla sjálvum arbeiðinum. Eisini verður møguleiki at keypa málningar og aðrir smálutir úr Kenya, kaffi verður eisini á skránni. Møguleiki er bert at stuðla við reiðum peningi hetta kvøldið.

Øll eru hjartaliga vælkomin í Miðlahúsið 13. januar kl.20

Lesast kann meir um arbeiði á:
*www. newlife-africa.org*

## Grønlandstíðindi

Kári við Stein

# Ljótasta veðurkort Linjohn hevur sæð

**Kári við Stein ynskir øllum eitt gott nýggjár við teimum seinastu tíðindunum úr Grønlandi**

**20. desember**
Í dag er -4 stig og stilli. Krabbabáturin Nagtoralik kom inn í gjárkvøldið við gott 15 tonsum av livandi krabba. Teir skulla út aftaná jól nýggjan túr.

Polar Nagtoralik kom inn í morgun við einum sjúkum manni. Teir loystu aftur aftaná døgurða. Lómur liggur í Nuuk um jólini, og Polar Aassik skal eisini liggja í Nuuk .

**21. desember**
Natarnaq kom inn at landa í morgun. Teir hava knapt 400 tons inni. Tað sama er Qaqqatsia inni í Nuuk og landar

**22. desember**
Natarnaq loysti í morgun nýggjan túr.

**23. desember**
Steffen C er inni í Manitsoq og landar. Teir hava fulla last inni.

**28. desember**
Hann lovar av ringasta veðri, at siga ódn. Akamakik kom inn í kvøld. Teir hava so at siga fulla last inni. Teir skulla byrja at landa í morgin tíðliga. Skiparin Linjohn Cristiansen sigur frá, at hann ongatíð hevur sæð eitt so ljót veðurkort, sum er frammi nú.

**29. desember**
Vindurin varð ikki so nógvur, sum vit roknaðu við her inni, men hann var nógvur úti á.

**30. desember**
Alamalik loyst nýggjan túr kl. gott 6 í morgun. Vit á landi sendu teimum einar 15 ljósrakettir, og teir svaraðu aftur við rakett og so trý ýl, og tað sama var her frá landi. Vakurt at síggja og gott at hoyra.

Í dag er Polar Amaroq inni í Nuuk og landar. Natarnaq er eisini inni í Nuuk og landar.

**4. januar 2010**
Vit komu øll gott inn í tað nýggja árið. Vit høvdu kavarok nýggjársaftan, so man sá ikki alt fýrverkaríið, sum bleiv skotið upp. Steffen C kom inn morgun at landa og at skifta fólk. Teir hava gott hálva last og rokna við at sigla í kvøld.

Í Nuuk er Regina C og landar. Qaqqatsiaq er inni í Manitsoq og landar.

**5. januar**
Polar Natoralik kom í dag inn við Polar Amaroq uppá sleip. Onkur boltur var farin, og tað mátti koma fólk úr Danmark at gera tað arbeiðið.

**6. januar**
Polar Qaasiut er komin inn at millumlanda. Teir skullu bert leggja tær kókaðu rækjurnar upp. Sekkirnir skulla teir hava við til Nuuk í næstu viku, har teir skulla landa. Í Nuuk landa Markus og Manu.

**7. januar**
Polar Nattoralik kom inn at landa til kl 2100, so loysa teir aftur. Tað gongur striltið hjá Polar Amaroq at fáa arbeiðið gjørt. Roknað var við at verða klárir í dag, men tað var av ongum.

**8. januar**
Í dag loysti Polar Amaroq, men ódnarveður var uttanfyri, so teir hava ligið og andøvt allan dag.

Gott nýggjár allir lesarir.